# Bygdarráðsfundur

# Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 26.05.2025 kl. 17.00

Á fundi: Janus Thomsen
Poul Laust Christiansen
Rakul Mørk
Jóhannes Liasson Rasmussen
Jónfinn L. Poulsen
Thorstein Thomsen (fyri Otto West)

Ikki møtt: Ronni Hammer

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

1. **102-27-2025: Dagstovnurin Brosið – starvslýsing v.m.**

Søkt verður um framhaldandi játtan av tímum til barn 20-25 tímar í frítíðarskúlanum.

**Stuðulsstarv 1.**

**Trivnaðarnevndin 25.05.2025:**

Samtykt varð at mæla til ikki at ganga umsóknini á møti.

**Fíggjarnevndin 26.05.2025:**

Samtykt varð einmælt at mæla til at játta umbidnu stuðulstímar.

**Avgerð:**

Atkvøtt varð um tilmæli hjá Trivnaðarnevndini, sum aftrat niðurstøðuni 25.05.2025 mælir til, at stovan, har barnið gongur, verður uppnormerað við 5 tímum aftrat um vikuna. Samtykt við 4 atkvøðum fyri.

**b. Stuðulsstarv 2.**

**Trivnaðarnevndin 25.05.2025:**

Mælt verður til at játta stuðulstímarnar, um umsøkjari við námsfrøðiligari útbúgving ella líknandi søkir starvið.

**Fíggjarnevndin 26.05.2025:**

Samtykt varð einmælt at mæla til at játta umbidnu stuðulstímar.

**Avgerð:**

Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum.

**c. Starvslýsing:**

Uppskot til starvslýsing, har søkt verður eftir námsfrøðingum, stuðlum og avloysarum.

**Trivnaðarnevndin 25.05.2025:**
Mælt verður til, at starvslýsingin verður broytt, soleiðis at søkt verður eftir einum stuðli og ikki tveimum.
**Fíggjarnevndin 26.05.2025:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at taka undir við starvslýsingini.
**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at taka undir við starvslýsingini, tó undantikið tí eina stuðulsstarvinum.

2. **102-28-2025: Starvsfólkatúrur.**
Uppskot og kostnaðarmeting av starvsfólkatúri í Stóru Dímun til viðgerðar. Roknað er við umleið 30 fólkum í Stóru Dímun og 40 til borðhaldið í Ranhøll.
**Trivnaðarnevndin 25.05.2025:**
Nevndin er samd um, at starvsfólkatúrurin skal verða. Ynskiligt er, at hesin dagurin verður ein fríggjadag.
**Fíggjarnevndin 26.05.2025:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at játta hesum.
**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum.

3. **102-26-2025: Ferðsluviðurskiftini í sóknini – innkomið tilboð.**
Tilboð frá Gunn Ráðgeving til gjøgnumgongd á staðnum, skeltiætlan til 40 km sonu og ferðslu-tálmandi tiltøk v.m. Væntaða tíðarnýtslan er 6-7 dagar – mettur kostnaður kr. 40.000-47.600 uttan MVG.
**Vega- og havnanevndin 05.05.2025:**
Nevndin mælir til at brúka ferðslurevisorin til at fáa skil á ferðsluviðurskiftini í Hvalba og at tikið verður av hesum tilboðnum fyri at fáa trygdina í lagi.
**Fíggjarnevndin 26.05.2025:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at taka av tilboðnum og fáa hetta gjørt.
**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum og taka av hesum tilboði. Somuleiðis varð samtykt at fáa eina gjøgnumgongd av Sandvík og Nesi eisini.

4. **Ikki alment mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir.  Fundur lokin kl. 18.45

Janus Thomsen  Poul Laust Christiansen  Rakul Mørk  Jónfinn L. Poulsen

Jóhannes Liasson Rasmussen  Thorstein Thomsen